KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 25.05.2022 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Rógvi Jacobsen, Jógvan Skorheim, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig
Varalimir: Andreas Josephsen møtti fyri Jógvan Skorheim
Ikki møtt:
Onnur: John Færø, trivnaðarstjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
41/22	22/00124-9	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (Jógvan Skorheim)
42/22	22/01022-1	Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2021
43/22	22/01026-1	Broyting av viðtøkum fyri grunnin, Mentanarhús í Klaksvík
44/22	22/00855-3	Marknaumskipan uttangarðs á Strond - matr.nr. 2 og 24
45/22	22/00861-2	Umsókn um umbýti millum matr.nr. 805a og 705a í Klaksvík
46/22	22/00571-4	Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 56a í Svínoy
47/22	21/01713-7	Byggisamtyktarbroyting fyri neystaøkið D36, Norðoyri
48/22	22/00723-3	Umsókn um byggiloyvi til seyðahús á matr.nr. 22, Árnafjørður
49/22	22/00817-5	Umsókn um grundstykki við Sandin - øki 15
50/22	21/01954-13	Leikvøllurin á Másheygi, óbrúkt játtan 2021 og eykajáttan – *fyrra viðgerð*
51/22	22/00748-1	Ung í arbeiði, víðari skipan – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
52/22	22/00513-2	Keyp av lendi
53/22	22/01016-2	Lántøkur 2022

Til viðgerðar

41/22
22/00124-9 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (Jógvan Skorheim)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	41/22

22/00124-9 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (Jógvan Skorheim)

Frágreiðing um málið:
Jógvan Skorheim, býráðslimur, hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 25. mai 2022. Næstvaldur á listanum er Andreas D. Josephsen.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Jógvan Skorheim.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Einmælt samtykt at lata Andreas D. Josephsen taka sæti í býráðnum til fundin.

42/22
22/01022-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2021

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	23.05.2022	28/22
2 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	42/22

22/01022-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2021

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 18. mai 2022, ið lýsir málið gjøllari

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

Sambært § 46 í kommunustýrislógini, skal býráðið eisini taka støðu til val av grannskoðara. Greinin er soljóðandi:

"Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.

Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum".

Í samband við fíggjarliga partin verður víst til s. 11 í ársroknskapinum (fíggjarstøða). Víst verður eisini til hesar talvur í protokollini: 4.1.6 eykajáttanir, 4.1.7 roknskapartøl 2016-2021, 4.1.8 nýtslan í mun til játtan, 4.1.10 lyklatøl, 4.2.7 langfreistað skuld.

Somuleiðis verður víst til mál 22/00802 Kunning um likviditetsstøðuna, sum er á skránni sum kunning hetta umfarið. Har er úrslitið hall 102,6 mió. kr., meðan úrslitið í endaliga roknskapinum vísir hall 102,4 mió. kr. Har eru reguleringar gjørdar síðani seinast, men netto er talan um 0,2 mió. kr.

Stutt um roknskapin
Roknskapurin vísir 102,3 mió. kr. í halli áðrenn avdráttir.

Lánini eru niðurgoldin við 8,2 mió. kr., og lán upptikin fyri 123,5 mió. kr. (íroknað kredittin í NSP upp á 37,8 mió. kr.) Netto eru lánini sostatt hækkaði við 115,3 mió. kr.

Inntøkurnar eru 293,8 mió. kr., rakstur 232,8 mió. kr., íløgur 148,7 mió. kr., rentustuðul 3,7 mió. kr. og fíggjarpostar 3 mió. kr.

Áogn skuldarum og skattaeftirstøðum v.m. er 17,5 mió. kr, áogn hjá Gjaldstovuni 24,9 mió. kr. og innistandandi 40,9 mió. kr.

Lániskuldin er 311,1 mió. kr., og kreditorar 42,2 mió. kr. og onnur skuld v.m. 12,5 mió. kr.

Lutfallið millum áogn og stuttfreistað skuld vísir, at gjaldførið pr. 31-12-2021 er ikki gott.

Nettoskuldin er 282 mió. kr., sum er 33,4 mió. kr. omanfyri álíkningina.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Kommunustýrislógin:
§ 46. Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.
Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.
§ 53, stk. 2, 1) roknskapurin skal verða landsstýrinum í hendi innan 1. juni eftir endað fíggjarár.

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Roknskapurin vísir 102,4 mió. kr. í halli.
Hallið er fíggjað við lántøku upp á netto 115 mió. kr.
Gjaldførið er ikki gott sæð í mun til virksemið hjá kommununi.
Skuldin er 311 mió. kr., og sum útlitini eru í dag, so fer skuldin at hækka í 2022.
Nettoskuldin er 33,4 mió. kr. omanfyri eina álíkning.
Mál er fyri nú um at taka lán upp á 50 mió. kr.

<u>Tilmæli:</u>
Mælt verður til, at fíggjarnevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

(Verður undirskrivað á býráðsfundinum.)

Fíggjarnevndin 23. mai 2022:
Nevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2021 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll einmælt góðkendur. Harumframt einmælt samtykt at lata SPEKT halda fram sum grannskoðari kommununnar.

43/22
22/01026-1 Broyting av viðtøkum fyri grunnin, Mentanarhús í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	43/22

22/01026-1 Broyting av viðtøkum fyri grunnin Mentanarhúsið í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Á stýrisfundi 16. mai 2022 í grunninum Mentanarhúsið í Klaksvík varð viðtikið at broyta viðtøkurnar fyri grunnin soleiðis, at borgarstjórin fer úr stýrinum.

> **"Leiðsla**
> **§ 3**
>
> Grunnurin verður umsitin av einum stýri við 7 limum, sum verða valdir soleiðis:
>
> - Klaksvíkar Sjónleikarafelag velur ein lim,
> - Norðoya Listafelag velur ein lim,
> - Norðurlandahúsið í Føroyum velur ein lim,
> - Vinnulívsráðið í Klaksvík velur ein lim,
> - Klaksvíkar Býráð velur tveir limir,
> - ~~Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu~~."

Hesa broyting skal býráðið eisini góðkenna sambært viðtøkum fyri stýrið, sum við hesum verður løgd fyri býráðið til góðkenningar.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin

Tilmæli:
Mælt verður til, at býráðið tekur undir við at broyta viðtøkurnar, sum víst omanfyri – *at borgarstjórin fer úr stýrinum.*

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Atkvøtt varð um tilmælið, dagf. 19. mai 2022; tað fall við 1 atkvøðu fyri (SVJ) og 8 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, RJ og ÓML). ADJ og TJL atkvøddu ikki.

44/22
22/00855-3 Marknaumskipan uttangarðs á Strond - matr.nr. 2 og 24

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.05.2022	70/22
2 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	44/22

22/00855-3 Marknaumskipan uttangarðs á Strond - matr.nr. 2 og 24

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umskipan av uttangarðspartinum í nevndu matriklum í Stranda haga (matr.nr. 53a)
Umskipanin ber í sær, at ein gyllin verður fluttur frá matr.nr. 2 til matr.nr. 24.
Uttangarðsparturin hjá matr.nr. 2 fer soleiðis úr 5 gl.13½ sk. til 4 gl.13½ sk., meðan uttangarðsparturin hjá matr.nr. 24 fer úr 5 gl.8½ sk. til 6 gl. 8½ sk.
Innangarðsgarðjørðin verður óbroytt.

Lógargrundarlag:
Matriklullógin
Almenn Byggisamtykt

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska umsiting hevur ongar viðmerkignar til umskipanina.
Við tað at talan er um smámunaliga broyting uttangarðs, mælir tekniska umsiting til, at málið verður avgreitt víðari til Umhvørvisstovuna eftir viðgerð í UBN og Býráðnum, og at Ánanevndin verður kunnað á fyrsta fundi, sum verður eftir summarferiuna.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. mai 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-05-2022.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Tilmælið frá UBN 16. mai 2022 einmælt samtykt.

45/22
22/00861-2 Umsókn um umbýti millum matr.nr. 805a og 705a í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.05.2022	72/22
2 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	45/22

22/00861-2 Umsókn um umbýti millum matr.nr. 805a og 705a í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Matr.nr. 805a liggur í 4 lutum innangarðs í Uppsalahaga:

1. Undir Fossum, niðanfyri Garðin - 722 m^2
2. Á Dalinum, vestanfyri veg o - 266 m^2
3. Í Brekkum - 58 m^2
4. Nýggja innleggið sunnanfyri brunnarnar - 500 m^2

Eigarin ynskir at leggja lut 2, 3 og 4 og tilhoyrandi gyllinin uttangarðs saman við matr.nr. 705a við sama eigara.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska umsiting hevur onga viðmerking til umsóknina.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. mai 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-05-2022.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Tilmælið frá UBN 16. mai 2022 einmælt samtykt.

46/22
22/00571-4 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 56a í Svínoy

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Svínoyarnevndin	06.05.2022	8/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.05.2022	69/22
3 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	46/22

22/00571-4 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 56a í Svínoy

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður tann 11. mars 2022 um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr.nr. 56a í Svínoy.
Talan er um at býta matr.nr. 56a í 12 partar, harav 10 eru ætlaðir til bygging

Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:

- Uppskot um Almenna Byggisamtykt fyri Svínoy liggur til almenna framløgu til 6. mai 2022
- Sambært fyriliggjandi uppskoti til byggisamtykt liggur umrøddi partur av matr.nr. 56a í økisparti A33 – útlagt til blandað íbúðar- og vinnuøki
- Sambært fyriliggjandi uppskoti til byggisamtykt er minsta mark grundøkjavídd sett til 300 m^2

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Privat verkætlan

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir til at viðmæla sundurbýti til fremjan, tá Almenna Byggisamtyktin er endaliga samtykt av býráðnum og góðkend av landsins myndugleikum.
Samstundis verður mælt til, at møguligar smærri reguleringar í marknaviðurskiftunum – herundir m.a. hornaavskurðir ísv. veg - kunnu avgreiðast millum umsøkjara og teknisku umsiting.

Svínoyarnevndin 6. mai 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini 26-04-2022. *Frímund Hansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.*

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. mai 2022:
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 6. mai 2022.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Tilmælið frá UBN 16. mai 2022 einmælt samtykt.

47/22
21/01713-7 Byggisamtyktarbroyting fyri neystaøkið D36, Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Norðoyrarnevndin	03.05.2022	2/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.05.2022	60/22
3 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	47/22

21/01713-7 Byggisamtyktarbroyting fyri neystaøkið D36, Norðoyri

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar býráð samtykti á fundi 21.12.2021 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina, D36 á Norðoyri. Eftir hetta hevur uppskot um broyting ligið frammi til alment eftirlit frá 28.01.2022-18.02.2022, og seinasta freist at lata inn kæru var 11.03.2022. Inn kom ein viðmerking/kæra. Eigarar av nøkrum av matriklunum hava viðmerkt, at teir ynskja at fyrihalda sær rætt at kunna brúka neystini til fastan bústað, umframt at teir ynskja at hava møguleika at samanbyggja neystini.

- Fyrisitingin vísir á, at tað er ikki loyvt ella siðvenja at loyva bústað í neystum, og mælir til at halda fast í hesum. At loyva fólki at hava bústað í neystum økjum fer at seta stór og umfatandi krøv til til dømis bygging av neystum, parkering, kommunalan rakstur og vetrarhald, sum økið als ikki ber.

- Í broytingaruppskotinum leggur fyrisitingin upp til, at hvør neystagrund ikki má fara upp um 60 m^2. Henda staðfesting er gjørd út frá meting av ymiskum neystum í kommununi, at verða neystini størri enn 60 m^2 í grundvídd, blíva tey ofta stór og klossut og lýða dámin á neystarekkjuni/økinum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.
Kommustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður frá at geva viðhald í kæruni.

Norðoyrarnevndin 3. mai 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-04-2022.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. mai 2022:
Nevndin tekur undir við Norðoyrarnevndini 3. mai 2022.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Tilmælið frá UBN 16. mai 2022 einmælt samtykt.

48/22
22/00723-3 Umsókn um byggiloyvi til seyðahús á matr.nr. 22, Árnafjørður

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Árnafjarðarnevndin	03.05.2022	4/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.05.2022	63/22
3 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	48/22

22/00723-3 Umsókn um byggiloyvi til seyðahús á matr.nr. 22, Árnafjørður

Frágreiðing um málið:
Søkt verður um at byggja eitt seyðahús á matr.nr. 22, Árnafirði. Húsið er 7,5 x 4,5 m. Ætlan er at byggja seyðahúsið á gomlu grundina, sum er staðsett uml. 28 m frá vegnum. Nevnast kann, at eitt annað seyðahús stendur í nærumráðnum.

Lógargrundarlag:
Økið er uttanfyri byggisamtyktina og tí útlagt til landbúnaðarøki. Ætlaða bygging liggur somuleiðis uttanfyri býarhegnið.
Umsóknin skal sendast til Friðingarnevndina til ummælis.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at játta umsóknini um bygging av seyðahúsi á matr.nr. 22, Árnafjørður.

Árnafjarðarnevndin 3. mai 2022:
Ein meiriluti, Karl Johansen, Mariann Maslyk og Olivar J. Olsen, tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 22-04-2022. Ein minniluti, Niclas Frederik Justinussen, tekur ikki undir við málinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. mai 2022:
Nevndin tekur undir við meirilutanum í Árnafjarðarnevndini 3. mai 2022.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá Atla S. Justinussen: "*Mælt verður til, at øll nýggj seyðahús verða bygt uttanfyri bøgarðarnar í framtíðini. Mælt verður eisini til, at byggisamtyktin ímillum Kráará og Stórá verður endurskoðað*"; tað fall við 1 atkvøðu fyri (ASJ) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, GvK, OáL, RJ, SVJ og ADJ). JCC, EÓP, ÓML og TJL atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá UBN 16. mai 2022; tað tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, GvK, OáL, JCC, RJ, ÓML, SVJ, TJL og ADJ) og 1 atkvøðu ímóti (ASJ,). EÓP atkvøddi ikki.

49/22
22/00817-5 Umsókn um grundstykki við Sandin - øki 15

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	16.05.2022	28/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.05.2022	66/22
3 Fíggjarnevndin	23.05.2022	32/22
4 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	49/22

22/00817-5 Umsókn um grundstykki við Sandin - øki 15

Frágreiðing um málið:
Umsitingin greiðir gjøllari frá málinum í skrivi 9. mai 2022. Í stuttum snýr málið seg um, at søkt verður um langtíðarleiga byggiøki 15 í miðbýnum við ætlan um at byggja á økið.



Serstaka byggisamtyktin fyri miðbýin, E1 – Øki 15 merkt við reyðum.

Um farast skal víðari við eini tilsøgn um leigu av øki 15, vil fyrisitingin vísa á niðanfyri standandi treytir:

- Bygningurin skal lúka øll myndugleikakrøv og ásetingar fyri økið.
- Byggingin skal verða í tráð við "*Designmanual Klaksvíkar kommuna, september 2015*" og "*Skipanaruppskotið, juni 2015".*
- At fundir verða millum umsøkjaran, umboð fyri kommununa og "miðbýararkitektin" í samband við tilgongdina.
- Tilsøgnin gongur út 18 mánaðir frá dagfestingini av hesum brævi. Um fyrireikingin av verkætlanini ikki er liðug innan 18 mánaðir, fellur tilsøgnin burtur.

Lógargrundarlag:

-Fyrisitingin vil vísa á leistin, ið nýttur við í samband við *Treytað tilsøgn um leigusáttmála til íbúðabygging av øki 5 og 6 í miðbýnum* (20/01234).
-Serstaka byggisamtyktin fyri E1.
-Skipanaruppskotið og Sniðhondbókin fyri miðbýin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar fíggjarligar avleiðingar ella bindingar fyri kommununa. Talan er um eina sjálvstøðugt fíggjaða, privata verkætlan, sum kommunan ikki er partur av.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi og til viðfestu umsókn, verður málið latið avvarðandi nevndum og býráðnum til viðgerðar.

Ferðslunevndin 16. mai 2022:
Nevndin tekur undir við ferðsluliga partinum av málinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. mai 2022:
Nevndin tekur undir við at langtíðarleiga økið til umsøkjaran.

Fíggjarnevndin 23. mai 2022:
Nevndin tekur undir við FeN og UBN 16-05-2022.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Tilmælið frá FíN 23. mai 2022 einmælt samtykt.

50/22
21/01954-13 Leikvøllurin á Másheygi, óbrúkt játtan 2021 og eykajáttan - *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	17.05.2022	26/22
2 Fíggjarnevndin	23.05.2022	29/22
3 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	50/22
4 Klaksvíkar Býráð	30.06.2022	

21/01954-13 Leikvøllurin á Másheygi - óbrúkt játtan 2021 og eykajáttan

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 6. mai 2022.

Minninýtsla var í íløgunum innan mentanarøkið í fjør á 10 mió. kr., talan er tí í hesum føri um at játta óbrúkta játtan frá 2021 til 2022. Tá samlaði tørvurin er 17 mió. kr., er umframt óbrúktu játtanina neyðugt við eykajáttan á 7 mió. kr. til liðugtgerð av leikvøllinum á Másheygi, sum verður liðugur í summar.

Hóast leikvøllurin á Másheygi er nógv seinkaður í mun til upprunaligu tíðarætlanina, so er væntanin at fáa eina góða góðsku á arbeiðinum, sum verður liðugt í summar.

Lógargrundarlag:
Kommunfulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Flyting av óbrúktari játtan innan mentanarøkið á 10 mió. kr., umframt eykajáttan á 7 mió. kr.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka undir við at seta av óbrúkta játtan frá mentanarøkinum, íløga, í 2021 á 10 mió. kr. til hesa verkætlan í ár, umframt eykajáttan á 7 mió. kr. til ítróttarøkið íløga, Másheygur.

Mentanarnevndin 17. mai 2022:
Ein meiriluti, JCC, GvK, og RJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 06.05.2022.
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 23. mai 2022:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við at framflyta 10 mió.kr. og at veita eina eykajáttan á 8,1 mió.kr. (vísandi til notat, dagf. 23-05-2022, frá vinnu og mentanarstjóranum); eykajáttanin verður fíggjað við lántøku.

TJL tekur støðu í býráðnum

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá SVJ: "*Mælt verður til, at 7 mió. kr. verða fluttar av íløgujáttan fyri 2022*"; tað fall við 2 atkvøðum fyri (SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og RJ). ÓML og ADJ atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið frá FíN 23. mai 2022; tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, RJ, ÓML, TJL og ADJ) og ongari ímóti. SVJ atkvøddi ikki.

51/22
22/00748-1 Ung í arbeiði, víðari skipan – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.04.2022	23/22
2 Fíggjarnevndin	26.04.2022	23/22
3 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	35/22
4 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	51/22

22/00748-1 Ung í arbeiði – víðari skipan

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. apríl 2022.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. apríl 2022:
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, dagf. 08.04.2022. Nevndin vil hava sama innihald í UíA.

Fíggjarnevndin 26. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við B&U 19-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 26-04-2022 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá BýR 28. apríl 2022 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

52/22
22/00513-2 Keyp av lendi

53/22
22/01016-2 Lántøkur 2022 - mai

Fundurin lokin kl. 20:15